# Summar FESTIVALUR ´05



Tað eru dagar, sum ongantíð fara í gloymibókina. Frammanundan varð væntað at 7000 fólk fóru at vera saman til Summarfestivalin, men tá løtan upprann so vóru vit nærri teimum 8000 túsund!
Ein væla mannfjøld av børnum, ungdómi og vaksnum sum fegin lýddu á og sungu við. Fólk úr øllum landinum, sum settu stevnu í Klaksvík fyri at hoyra frálíkan tónleik og njóta góðan mat og upplivingar saman.

Vit vilja siga øllum vitjandi hjartans tøkk fyri góða lagið og fyrimyndarligan hugburð á Summarfestivalinum.
Takk til løgreglu, sjúkrahús, samerittar og eftirlitsfólk fyri góða trygd og tykkara arbeiði at koma vandum og trupulleikum í forkeypi.
Takk til Klaksvíkar Kommunu fyri dyggan stuðul og arbeiðsfólk tess fyri at fríðka um miðbýin og annars gott arbeiði í samband við festivalin.
Takk fyri lán og leigu av toilettvognum og teltum.
Takk til N.F.Í og til tey feløg og handlar sum bjóðaðu seg fram við mati og tilboðum til tey vitjandi.

Takk til Kunningarstovuna fyri góða samskipan og veitta tænastu til bátar, fólk við tjaldum og bilvognum og onnur vitjandi, sum hava roynt at funnið sær innivist.
Takk til allar norðoyingar sum hava víst hjartarúm og húsrúm soleiðis at flest øll sum ynsktu tað sluppu á Summarfestival.
Takk til frásøgufólk, tónleikarar, teknikarar, ljósfólk, elektrikarar, timburmenn, bilførarar, skótar, kokkar, tænarar, bilettsølufólk, starvsfólkini hjá Shell kring landið, vaskikonur og ruddingarmenn.
Takk til allar lýsarar og stuðlar og til øll feløg og stovnar, sum hava roynt at gera sítt fyri fyri at Summarfestivalurin skuldi hepnast so væl.

Við hoyrast og síggjast aftur 4. - 6. august 2006!

Bestu heilsanir

www.summarfestivalur.fo